Almannamálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	29. september 2020
Mál nr.:	20/00799
Málsviðgjørt:	BÁT
Eftirkannað:	24. september 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a (Lestrarstuðul frádrigin í fyritíðarpensjón)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.
(Lestrarstuðul frádrigin í fyritíðarpensjón)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 2020, verður aftan á § 19, men áðrenn yvirskriftina yvir § 20, sett:

"**§ 19 a.** Hjá persóni, sum móttekur fyritíðarpensjón, og samstundis móttekur lestrarstuðul sambært lógini um lestrarstuðul § 6, stk. 2, nr. 1, nr. 3, nr. 6, nr. 7 og nr. 9, verður lestrarstuðulin drigin frá grundupphæddini.

Stk. 2. Er lestrarstuðulin hægri enn grundupphæddin, verður upphæddin, sum er hægri enn grundupphæddin drigin frá í avlamisviðbótini. Fyri lægstu fyritíðarpensjonistar verður drigið frá í eyka viðbótini."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjald av veitingum frá og við januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið er liður í ætlanini hjá landsstýrinum at tálma útreiðslunum á fíggjarlógini fyri 2021.

1.2. Galdandi lóggáva
Fyritíðarpensjonistar undir útbúgving fáa, við galdandi lóggávu, bæði pensjón og lestrarstuðul. Báðar veitingarnar eru uppihaldsveitingar, og sostatt er talan um dupultkompensasjón.

Fyritíðarpensjonistur undir útbúgving kann í ávísum førum hava inntøkur, sum eru munandi hægri enn vanligar lønarinntøkur á arbeiðsmarknaðinum.

	Ógift	Gift
Hægsta fyritíðarpensjón	14.150	11.900
Miðal- og lægsta fyritíðarpensjón (uml.)	11.650	9.600
Lestrarstuðul	4.471	4.471

Hevur tann lesandi fyritíðarpensjonisturin børn, verður barnaviðbót sambært almannapensjónslógin veitt, umframt barnastuðul frá Studna. Og um viðkomandi eisini er stakur, kann viðkomandi harumframt eisini hava rætt til barnaískoyti til stakar uppihaldarar, familjuískoyti og barnagjald (barnagjald er tó ikki ein almennur stuðul men er eitt gjald frá einum foreldri til hitt foreldrið).

Inntøkan aftaná skatt og gjøld hjá einum giftum persóni við miðal fyritíðarpensjón uttan børn er góðar 14.000 kr. um mánaðin. Um viðkomandi hevur tvey børn er inntøkan aftaná skatt umleið 20.600 kr. (tá er barnafrádráttur í skattinum tikin við)

Inntøkan aftaná skatt og gjøld hjá einum ógiftum persóni við hægstu fyritíðarpensjón uttan børn er góðar 18.600 kr. um mánaðin. Um viðkomandi hevur tvey børn er inntøkan aftaná skatt og gjøld umleið 26.700 kr. Harumframt kann viðkomandi hava rætt til barnaískoyti til stakar uppihaldarar, familjuískoyti og barnagjald, og tá er inntøkan uml. 33.000 kr. um mánaðin aftaná skatt og gjøld.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at fyribyrgja, at persónar kunnu fáa dupulta veiting til uppihalds.

Tá ein fyritíðarpensjonistur móttekur lestrarstuðul, so lækkar grundupphæddin við samsvarandi upphædd. Tá ein fyritíðarpensjonistur móttekur lestrarstuðul á 4.471 kr., tá lækkar grundupphæddin eisini 4.471 kr. Inntøkan verður sostatt tann sama sum hjá øðrum fyritíðarpensjonistum, sum ikki hava aðrar inntøkur.

Um talan t.d. er um fyritíðarpensjonist, sum er stakur uppihaldari við tveimum børnum, tá er lestrarstuðulin hægri enn grundupphæddin. Í teimum førum at lestrarstuðulin er hægri enn grundupphæddin, lækkar avlamisviðbót ella eykaviðbótin eisini.

Broytingin fevnir um øll pensjónsstigini – hægsta, miðal og lægsta, herundir eisini persónar, sum fáa fyritíðarpensjón vegna einkju- ella einkjumannastøðu.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær, at fyritíðarpensjonistar ikki fáa dupulta veiting, um teir gerast lesandi.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er eitt fylgilógaruppskot til fíggjarlógaruppskotið fyri 2021, og tað hava ikki verið stundir at sent uppskotið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. At fyritíðarpensjónin lækkar, tá pensjonistur eisini móttekur lestrarstuðul hevur við sær, at útreiðslur landskassans lækka. Við støði í hagtølum frá 2019 verður mett, at útreiðslur til § 12 almannamál lækka við uml. 750.000 kr. um árið.

Hjá einum týðandi parti av fyritíðarpensjonistum er skattskylduga inntøkan so mikið lág, at tey rinda nærum ikki kommunuskatt. Broytingin hevur sostatt sera avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur við sær, at Almannaverkið skal tillaga nakrar mannagongdir í sambandi við lækking av fyritíðarpensjón.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur við sær, at hjá fyritíðarpensjonistum, sum eru lesandi, lækkar grundupphæddin samsvarandi lestrarstuðulsupphæddini. Inntøkan verður tó í minsta lagi tann sama, sum hjá fyritíðarpensjonistum, sum ikki hava aðrar inntøkur. Er talan um pensjonist við børnum, verður inntøkan eitt sindur hægri enn hjá pensjonistum, sum ikki eru lesandi.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld

Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Hjá persóni, sum móttekur fyritíðarpensjón, og sum samstundis móttekur lestrarstuðul, verður lestrarstuðulin drigin frá grundupphæddini.

Stk. 2. Um so er, at lestrarstuðulin er hægri enn grundupphæddin, verður upphæddin, sum er hægri enn grundupphæddin, drigin frá í avlamisviðbótini og fyri lægstu fyritíðarpensjonistar í eyka viðbótini.

Drigið verður frá soleiðis:

- Hjá hægstu og miðal fyritíðarpensjonistum verður upphæddin drigin frá avlamisviðbótini,
- Hjá lægstu fyritíðarpensjonistum verður upphæddin drigin frá eykaviðbótini.

Dømi 1
Ógiftur hægsti fyritíðarpensjonistur uttan børn, sum móttekur lestrarstuðul á 4.471 kr. Her lækkar grundupphæddin (sum er 6.030 kr.) soleiðis: 6.030 kr. minus 4.471 = 1.559 kr.

Dømi 2
Giftur miðal fyritíðarpensjonistur við tveimum børnum, sum móttekur lestrarstuðul á 6.543 kr. Grundupphæddin til gift er 4.791 kr. Grundupphæddin lækkar tí niður til 0 og harumframt lækkar avlamisviðbótin við tí, sum manglar í fyri at koma upp á lestrarstuðulsupphæddina. Avlamisviðbótin skal tí lækka við 6.543 kr. minus 4.791 kr. = 1.752 kr. Avlamisviðbótin, (sum upprunaliga er 2.814 kr.) lækkar tí soleiðis: 2.814 kr. minus 1.752 kr. = 1.062 kr.

Broytingin fevnir um øll pensjónsstigini – hægsta, miðal og lægsta, herundir eisini persónar, sum fáa fyritíðarpensjón vegna einkju- ella einkjumannastøðu.

Til § 2
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjald av veitingum frá og við januar 2021.

Almannamálaráðið, 29. september 2020.

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur